VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og ælingur, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið hósdagin og fríggjadagin:
Fleyr til gul av útnyrðingi, seinni av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 10 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og fyri tað mesta turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

Málningar og skulpturar í Smiðjuni

Fríggjadagin letur upp forvitnislig listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har havnarkonan, Lisbeth Mortensen, sum hevur búð í Danmark síðan 1992, fer at sýna fram málningar og skulpturar

FRAMSÝNING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Fernisering verður í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin, 16. september, klokkan 13, og framsýningin verður opin til mikudagin, 21. september.

Frá 23.-28. september fara myndirnar hjá Lisbeth at hanga á Torginum í SMS.



Hon flutti niður til Danmarkar í 1992, har hon hevur fingist við list, og nú fríggjadagin letur hon upp framsýning í Smiðjuni í Lítluvík
Mynd: Jens Kr. Vang

Flutti niður

Lisbeth Mortensen er ættað úr Havn. Hon flutti niður til Danmarkar í 1992 og byrjaði á Listaskúla árið eftir. Á skúlanum lærdi hon at mála og gera skulpturar. Seinastu árini hevur hon havt nógvar framsýningar kring um í Danmark, og hon hevur eisini verið á listaferð í Grønlandi í nakrar mánaðir.

Í 1994 fekk Lisbeth legat, sum gav henni møguleikar at halga sær listina eitt longri tíðarskeið í Suðurjútlandi, og eftir hetta var hon ikki í iva um, at tað var listini, hon skuldi arbeiða við.

Lisbeth ger eisini skulpturar úr ymiskum tilfari, og hon málar við vatnlitum (akvarel) og ger oljukritstekningar.

Í apríl varð hon bjóðað at luttaka í Nordisk Dag í Aalborg, har fleiri føroysk tiltøk skuldu vera, og í hesum sambandi sýndi hon fram sína føroysku myndlist.

Í Indiu

Í februar í ár var Lisbeth í Indiu saman við eitt nú soninum, Christiani og Ann Mari Nybo úr Vero Moda í SMS. Tey fóru saman við átta øðrum á vitjan hjá børnum, sum tey sponsorera.

Lisbeth hevur málað málningar úr Indiu, sum eru prentaðir til postkort, har peningurin fyri søluna fer til børn í Norðurindiu. Hon stuðlar International Børnehjælp og verða á framsýningunum í Føroyum ymiskir lutir seldir til frama fyri hesi børn.

Í november í ár fer hon í 5 mánaðir at arbeiða við brekaðum børnum í Indiu.

Framsýningarnar hjá henni í Føroyum verða sum nevnt í Smiðjuni í Lítluvík (16.-21. sept.) og á Torginum í SMS (23.-28. sept.).

Meira kann lesast um Lisbeth Mortensen á www.lisbethmortensen.dk

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	2
Nuuk	3
Qaqortoq	8
Ammassalik	4
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	8
Seyðisfjørður	--
Tórshavn	8
Lerwick	10
Aberdeen	16
London	20
Tromsø	5
Bergen	11
Oslo	--
Stokkhólm	15
Keypmannah.	18
Helsinki	11
Moskva	17
Berlin	18
Warzawa	25
Kiev	24
Bukarest	26
Paris	18
Madrid	23
Róm	25
Malorca	27
Athen	29
Malta	26
Tunis	26
Beijing	20
New Dehli	31
Bangkok	30
Jakarta	30
Sydney	18
New York	31
Miami	30
Los Angeles	21
Meksikobýur	20
Panama	27
La Paz	8
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 974 hPa. ~ex "MARIA" ~ sunnan fyri Ísland fer í landnyrðing eystan og grynnist spakuliga.

Í dag:
Lágttrýstið yvir Norður~Skandinavia hvørvur eystureftir. Hátrýstið í útsynning úr Íslandi mennist nakað og gevur væntandi góðveður á okkara leiðum seinni í vikuni.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 12/9 kl. 06⁰⁰– 13/9. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,1°
Minsti hiti máldur í sept.: - 0,5° - Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,5 mm – mált frá 12/9 kl. 06⁰⁰– 13/9 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í september: 23,3 mm

www.sosialurin.fo

VESTFALLSKYRRINDI

11. september Fyrra kvarter
16. september Mánin næstur jørðini
18. september Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
14. Sept	03.59	16.27	02.59	15.27	03.14	15.42	05.59	18.27	06.59	19.27	02.14	14.42	01.14	13.42	04.14	16.42	05.14	17.42	03.44	16.12	04.59	17.27
15. Sept	04.55	17.21	03.55	16.21	04.10	16.36	06.55	19.21	07.55	20.21	03.10	15.36	02.10	14.36	05.10	17.36	06.10	18.36	04.40	17.06	05.55	18.21
16. Sept	05.48	18.11	04.48	17.11	05.03	17.26	07.48	20.11	08.48	21.11	04.03	16.26	03.03	15.26	06.03	18.26	07.03	19.26	05.33	17.56	06.48	19.11
17. Sept	06.35	19.00	05.35	18.00	05.50	18.15	08.35	21.00	09.35	22.00	04.50	17.15	03.50	16.15	06.50	19.15	07.50	20.15	06.20	18.45	07.35	20.00
18. Sept	07.25	19.48	06.25	18.48	06.40	19.03	09.25	21.48	10.25	22.48	05.40	18.03	04.40	17.03	07.40	20.03	08.40	21.03	07.10	19.33	08.25	20.48

5 707265 100036 >